## DAGSINS MEINING

# Sambandsvalið

Hóast gitingar gingu í krókunum allan fríggjadagin um, at Johan Dahl tingmaður sambandsfloksins í Suðuroynni fór at koppa verandi formanninum Kai Leo Johannesen av formanssesssinum, so gjørdist hetta ikki endin. Tvørturímóti vann Kai Leo Johannesen ein tryggan sigur við meira enn 10 atkvøðum á avbjóðaranum.

Johan Dahl hevur ført fram eitt nú her í blaðnum, at brúk er fyri einum formanni, sum gevur flokkinum størri profil tvs. ger flokkin meira sjónligan í kjakinum. Hetta hevur hann helst rætt í, men tað er eisini ein sannleiki við modifikatiónum. Tí í og við at Sambandsflokkurin hevur lagt gomlu sambandslinjuna á hillina ella heilt lagt hana aftur um seg, so hevur flokkurin eisini brúk fyri at vinna tíð til at finna seg sjálvan í tí nýggja leiklutinum, sum ein flokkur, ið roynir at liggja tættari miðjuni, tá tað snýr seg um sjálvstýrispolitikkin.

Avbjóðarin átti eisini at vitað, at sambandsfólk hava ikki lindi til at skifta støðu uttan víðari. Og tá verandi formaður bert hevði roynt seg í avmarkaða tíð, so hava uttan iva mong teirra hildið, at hann átti at sleppa at royna, hvat hann dugur til, og tað vil siga at føra flokkin gjøgnum eitt val. Nú kann tað sjálvandi vera, at Johan Dahl fær rætt, tá avtornar, tvs. at fer flokkurin at fáa eitt ringt val, so ber til at skjóta ábyrgdina á formannin. Hinvegin kann eisini henda, at flokkurin fer at fáa eitt gott val uttan mun til, hvør formaðurin er, tí flokkurin hevur fingið aðrar at profilera seg enn bert leiðsluna, og her verður serstakliga hugsað um fíggjarmálaráðharran, sum hevur víst gott hegni og at duga væl at umboða flokkin.

At Johan Dahl nú hevur gjørt av at kvitta við flokkin og hevur tikið seg úr tingmanningini má sigast at vera eitt sera drastiskt stig, tí mótvegis sínum veljarum hevur hann eina stóra ábyrgd, tó at tingmaðurin er suverenur. Men er tað so, at tað, sum Johan Dahl stendur fyri, og tað hann vil í politikki, ikki samsvarar við leiklutin hjá flokkinum og verandi formanni, so ber til at skilja hann. Ein kann so spyrja, hví hann ikki bíðaði og tók seg aftur til komandi val!

Hvussu og ikki so er eisini greitt, at Johan Dahl við sínum oftani sera avgjørdu meiningum hevur verið við til at gera føroyskan politikk meira sjónligan. Er tað so, at hann fer at taka seg úr politikki, so kunnu vit bert siga, at tað verður saknur í hansara rødd og eisini mangan áhugaverdu meiningum. Og at tað eisini fyri Sambandsflokkin verður ein missur at skulla missa hesa so eyðkendu rødd á tingi. Um alt hetta rumblið fer at hava nakra ávirkan á samgongustevið er ikki greitt, men neyvan fer tað tað. Spurningurin er so í hvønn mun hann kann halda fram í ábyrgdarsessum so sum formansessinum í Uttanlandsnevndini. Áhugvert verður at fylgja gongdini komandi tíðina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# USA plágar tey kristnu í Russlandi við rokktónleiki

**JOHN S. MYLLHAMAR**



Eftir at Sovjetsamveldið datt sundur, gjørdust fyrrverandi kommunisku londini eitt gott mál fyri vesturlensku vælferðarlæruni, sonevndu dýrdarguðfrøðini. Tey áður kúgaðu kristnu í gamla Sovjet, stóðu spyrjandi hvat hetta var fyri læra, ið m.a. hevði sum herróp, at hevði tú ta ávísu nøgdina av trúgv, varð tú grøddur fyri allar sjúkur, umframt at tú gjørdist ríkur. Í tí eystureuropeisku kirkjuni skiltu tey einki av hesum. Royndirnar høvdu lært tey tað øvugta. Frísk kristin vóru kastaði í fangahús. Doyðu tey ikki í fongslinum, so komu tey út aftur haðani sum sálarligir ella likamsligir kriplingar. Høvdu tey gott arbeiðið, mistu tey tað, tí at tey høvdu tikið við kristnari trúgv. Mong vóru noydd at gevast við síni útbúgving. Tey ríku gjørdust fátæk vegna teirra kristnu trúgv.

Nú kemur so aftur ein áheitan á vesturheimin frá kristnum leiðarum í Russlandi móti einum nýggjum vanda. Í seinast útkomna norska bóklinginum ”SHOFAR”, sum kemur út fýra ferðir árliga, verður eitt bræv endurgivið. Tað eru Peter Peters og Vasilij Ryzhuk, ið eru ávikavis leiðari og elsti í tí ikki-skrásettu kirkjuuniónini í Moskva, sum í ráðaloysi hava sent tað út frá teimum kristnu í landinum, sum vera plága av vesturlendska popptónleikinum. Í brævinum stendur:

”Í tríatí ár hava vit knógva undir einari intensivari forfylging, og nú elvir frælsið til nýggjar líðingar í kirkju okkara, í formi av rokktónleiki, sum kristin í USA senda higar tá ið tey senda trúboðarar til okkara saman við stórum rokkbólkum. Okkara ungu taka ikki lut í slíkum tiltøkum, tí vit hava givið lyfti um ongantíð at luttaka í verðslinum njótingum. Men tað kennist sum ein tung byrða, at mong koma hendan vegin við bíbliuni á lofti og blanda hana uppí rokktónleikin, og vit skammast at kristindómurin ber seg soleiðis at. Ikki vita vit hvussu vit skulu málbera okkum tá ið vit bøna tykkum um at halda uppat við hesum. Her skýggja vit tann kristiliga rokktónleikin, sum nú verður førdur inn í land okkara.

Rokktónleikurin hevur einki felags við tænastuna fyri Guð, og vit seta okkum avgjørt ímóti at tey kristnu í USA føra inn hesa avskeplaðu myndina av evangeliinum. Tað ið okkum tørvar, er andalig føði. Tí biðja vit tykkum: – gevi okkum hitt sanna breyðið – ikki súrdeiggið!

Vit vita væl, at rokktónleikurin dregur stóra fjøld av menniskjum í kirkjurnar, men tað førir ikki til eitt lív í guðsótta. Í 11 ár hava vit sitið í fongsli fyri trúgv okkara. Vit fingu ikki loyvið at lurta eftir kristnum sálmasangi, men rokktónleikurin var brúktur sum vápn móti okkum – hann var spældur dag og nátt fyri at bróta niður okkara mótstøðumegi. Úthaldni í bøn og føstu var okkara einasta bjarging fyri ikki at hokna undir.

Nú liva vit í eini tíð har opinleikin er størri, og vit vera ikki longur tveitt í fongsul, men nú eru tað ístaðin tey kristnu ú USA, sum plága okkum, tey smitta og dálka tey ungu, og vaksin við.

Vit, bæði leiðarar og kirkjuliðið í teirri ikki-skrásettu kirkjuuniónini, hon, ið áður var nevnd, hin forfylgda kirkjan, eru samd um, ikki undir nøkrum formi at geva rokktónleikinum loyvið at koma inn í okkara kirkjur, og vit áminna tykkum nú so sterkt sum vit kunnu, at lurta eftir okkum, og ráða tykkum til at halda tykkum langt burtur frá slíkum formi fyri tónleiki, og ikki at hava hann við inn í land okkara.

Vanhalgi ikki okkara ungu á slíkan hátt. Sjálvt tey, sum ikki trúgva, vita at hetta er ikki kristin tónleikur, og tey skilja heldur ikki hvussu tey kristnu í USA kunnu vera so verðslig. Vit kunnu eisini fortelja tykkum, at tá ið fólk í landi okkara, sum ikki trúgva, hava verið á slíkum konsertum, har bíblian eisini var havd á lofti, so eru tey farin sera vónsvikin út aftur, vónbrotin av kristindóminum.

Hesin tónleikur er tónleikur frá helviti og vit heita á tykkum øll í USA um ikki at lata pening til at slíkar konsertir verða hildnar í Russlandi. Vit vilja ikki hava nakað annað enn sannan kristnan sang og tónleik í kirkjum okkara. Øll vit, ið hava ábyrd í kirkjuni, hava verið samd um at gera hesa samtykt”.

Hevði leiðslan í vestureuropeiskum kirkjum og samkomum, eisini í Føroyum, havt verið líka árvakin og kent sína ábyrd líkt kristnu leiðarunum í Russlandi, tá høvdu vit ikki verið endaði har vit eru, nú fólk ikki longur duga taka dagar ímillum hvat er verðsligur og hvat er andaligur sangur og tónleikur. Verðsligi andin hevur fingið yvirræðið, og í átrúnaðaðarliga rúsinum og fløkjuni, eru tey fá, sum leggja í ella megna at skera ígjøgnum her. Eingin torir tað heldur.

Fyri at endurgeva eina unga føroyska gentu: ”Eg gangi bæði á diskotek og til kristiligar konsertir, tí tað er eingin munur”.

Illur???

Sig tína meining í Sosialinum




Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.